www.fma.fo

# Málsviðgeri til Sjóvinnustýrið

**Eitt spennandi starv sum málsviðgeri á manningardeildini er leyst at søkja. Uppgávurnar á Manningardeildin fevna m.a. um manningarásetan til fiskiskip og handilsskip, útvegan av vinnubrøvum og yvirordnað mynstringareftirlit**

**UM STARVIÐ**
***Starvið fevnir í høvuðsheitum um hesar upppgávur:***

- málsviðgerð av vinnubrøvum, undir hesum málsviðgerð av vinnubrøvum hjá útlendskum sjómonnum, sum sigla við føroyskum skipum
- at fyrireika manningarskjøl til fiskiskip, farmaskip og ferðamannaskip
- at hava umsjón við mynstringum og viðurskiftum, sum knýta seg at mynstring sum t.d. at føroyskir sjómenn lúka krøvini til førleika á skipunum teir sigla við
- luttaka í fyrireikingararbeiðið til lógarsmíð
- at hava eftirlit og umsita viðurskiftini, sum eru staðfest í STCW konventiónini og ILO konventiónum, ið knýta seg at manningarviðurskiftum á skipum
- samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar
- leggja tilfar út á heimasíðuna

**ÚTBUGVINGAR- OG FØRLEIKAKRØV**
Søkt verður eftir fólki sum hevur skrivstovuútbúgving, miðnámsútbúgving, ella aðra viðkomandi útbúgving.

***Harumframt krevst:***

- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti
- góð samstarvsevni
- góðan telduførleika
- jaligan hugburð

Tað er ein fyrimunur, men ikki eitt krav, um viðkomandi hevur kunnleika til dygdarmenning, so sum ISO 9001 ella líknandi.

**SETANARTREYTIR**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Sjóvinnustýrið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett sum skjótast.

**UMSÓKNIR:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnustýrið í hendi í seinasta lagi 20. september 2010, kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Sigfrid Petersen, samskipara ella Vilhjálm Gregoriussen, stjóra.

***Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:***

Sjóvinnustýrið
Postsmoga 26
FO-370 Miðvágur

ella fma@fma.fo

Sosialurin 341800

## Sjóvinnustýrið

Postsmoga 26, FO-370 Miðvágur, fma@fma.fo




Umbiðið kalendaran nú
og sendið hann til útheimin

Tel. 341800
Johanna Vang
johanna@sosialurin.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

## SPEKT søkir vaskifólk

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f søkir vaskifólk at byrja skjótast gjørligt. Arbeitt verður aðru hvørja viku.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# Til Sølu

Hugnalig tvíhús, sera økonomisk á, Norðskála til sølu.

Húsini er 1 plan við óinnrættaðum lofti sum kann innrættast.

Køkur - stova - WC/bað - 3 kømur - bryggers - gongd.

Byggiár 2008-2009.

Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvi,
tætt við handlar, barnagarð og skúla.

Er hetta nakað fyri teg, vinarliga ring 562070 - 562080
ella maila til janj@olivant.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!